Runavíkar kommuna

## Námsfrøðingur til Dagstovnin í Skálafirði

Á dagstovninum í Skálafirði eru 2 vøggustovur við 12 børnum í hvørjari. Vit eru stovnur undir Runavíkar Kommunu og halda til í leigaðum hølum í Kelduni í Skálafirði. Umstøðurnar á stovninum eru góðar, hølini eru rúmlig og ljós og vit liggja tætt við haga og fjøru.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum, at geva tí møguleika at mennast bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum, er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**
Námsfrøðingi, 35 t. um vikuna til Reyðu Stovu. Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin. Ein týðandi partur av arbeiðinum verður at stuðla einum 2 ára gomlum barni í gerandisdegnum.

Setan verður frá 11. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Lis Sørensen, leiðara, á tlf 442252 ella 212252.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **mikudagin 23. juli 2008, kl. 12.00**

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

### Lektari í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B.S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta 1. oktober 2008.
Umsóknarfreistin er **11. august 2008.**

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**

***FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA***
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

## Løgfrøðingur til Løgtingsins umboðsmann

Í sambandi við farloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum avloysari fyri fulltrúa hjá Løgtingsins umboðsmanni leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast gjørligt fyri tíðarskeiðið frá 1. september 2008 til 31. august 2009.

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit við almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, tveir løgfrøðiligir ráðgevar og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:**
- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

Talan er um eitt rættiliga avbjóðandi starv í tøttum samstarvi við umboðsmannin.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina. Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi II, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 4. august, kl. 12.**

Adressan er:
**Løgtingsins umboðsmaður**
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann á tlf. 358500/218691.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Almanna- og Heilsumálaráðið í summarfrítíðini**

## Avmarkað avgreiðsla í summarfrítíðini

Almanna- og heilsumálaráðið fer í summarfrítíðini frá

**14. juli - 1. august 2008**

bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.

Hetta tíðarskeiðið verður avgreiðslan avmarkað, soleiðis at telefonin svarar **millum kl. 10-12** allar gerandisdagar. Avgreiðslan virkar aftur sum vanligt frá mánadegnum 4. august 2008.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd í tíðarskeiðnum frá 14. juli til og við 1. august 2008.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir